# Áheitan frá Miðflokkinum um skipan av einari tvørpolitiskari bjargingarstjórn!

JENIS AV RANA

Formaður Miðfloksins



Longu áðrenn samgongan gavst við royndum sínum at evna til eina fullfíggjaða fíggjarlóg, varð greitt, at hon hevði mist førleikan at stjórna landinum. Tí er bráneyðugt at politikkarar tvørturum floksmørk finna saman at skipa eina bjargingarsamgongu.

Tá alheimskreppan, fyri góðum hálvum øðrum ári síðani rakti flestu heimsins lond vóru Føroyar sera væl fyri at stýra uttan um teir brotasjógvar, sum onnur hóknaðu undan. Í fleiri ár var almenna skuldin lítil og eingin, undirskot á fíggjarlógini ókent, arbeiðsloysi so gott sum einki, fiskiskapurin nøktandi, avtalur gjørdar millum land og kommunur um fíggjarstýring- og vit kundu hildi á at víst á positiv viðurskifti, sum, um rætt varð farið fram, treytaðu okkum bjørt útlit.

Kortini vórðu øll atlit til ein burðardyggan búskap slept og heldur enn at leggja upp fyri búskaparligum uppgangstíðum, varð búskapurin ovurhitaður og langtíðarmál slept. Hóast ávarðingar um hendan grundleggjandi skeiva politikkin vórðu givnar væl áðrenn alheims fíggjarkreppan eisini setti síni árin á føroyska samfelagið, valdi landsins leiðsla at lata standa til.

**Broyttu ikki kós hóast greiðar ávaringar**

Ístaðin fyri at laga búskapin eftir greiðu ávaringunum, repa seglini og leggja upp fyri versnaðu útlitunum, varð hildið fram á somu kós. Óneyðugir og altoyðileggjandi skattalættar hildu á at verða veittir, ovurnýtslur á kontum landsstýrismanna vórðu góðkendar, sjálvsagdar sparingar vórðu ikki gjørdar, nýggir inntøkumøguleikar ikki troyttir - alt við tí úrsliti, at Føroyar skjótt kunnu koma at standa fyri hóttandi krøvum frá teimum, ið vit noyðast at biðja um lán fyri at bjarga okkum undan risaundirskotum á fíggjarlógum landsins. Undirskotið, sum í fjør var góðar kr. 300 mió, táttar í ár í eina mia., og verður neyvan minni komandi - tvs. góðar 2 milliardir. kr. eftir trimum árum!

Andstøðuflokkarnir hava, saman og hvør sær, ferð eftir ferð víst á vandan við verandi kós, tó higartil úrslitaleyst. Heystið fór, veturin kom og ístaðin fyri fíggjarlóg, ið átti at tikið atlit ikki bert til dagin í dag, men árini fram, fingu vit eina visiónsleysa kompromiloysn uttan framtíðaratlit ella nútíðarmedvit. Sparingarnar, ið gjørdar eru muna lítið og einki, og farið varð inn á røkur, ið áttu at verið friðaðar.

Her verður hugsað um tær røkur, ið hýsa veikastu samfelagsborgarum okkara.

**Neyðugt við tvørpolitiskari bjargingarstjórn!**

Áheitan Miðfloksins er, at vit skipa eina virkisføra bjargingarstjórn við tí greiða máli at bjarga Føroyum og føringum undan tí fíggjarliga og politiska húsagangi, sum lættliga kann gerast veruleiki um verandi visiónsloysi heldur á.

So skjótt gerandisdagar byrja aftur í nýgja árinum eiga samráðingar at verða tiknar upp við tí fyri eyga at skipa eina bjargingarsamgongu av politikkarum, tvørturum floksmørk, ið hava dirvi at taka tey tøk, sum flestu innast inni vita eru neyðug fyri at hóra undan. Tøk, sum krevja dirvi at fara inn á røkur, sum tykast friðaðar av verandi samgongu, men sum mugu troytast, skal samfelagsskútan rættast uppaftur.

Óivað er onkur, ið er meira hugaður at skriva út væl. Meti tó hendan møguleikan at vera minimalan, tí neyvan finnast fleiri politikkarar við so lítlari ábyrgdarkenslu, sum slík uppskot krevur.

# Suðurøkið?

HARRY JENSEN

úr Skúgvi, sum saman við Dímun liggur ímillum syðru og norðaru helvt av Suðurøkinum

Eg royni, so vítt møguligt, ikki at gera viðmerkingar alment, men nú haldi eg, meg noyðast at koma við átalum.

Sum ikki einaferð er tað umstøður okkara, tá vit og onnur skulu ferðast til og frá okkara oyggj, ið tað snýr seg um.

Um vit nakrantíð fáa betra um okkara ferða umstøður, veit eg ikki, men sjálvandi vóni eg tað.

Men tað, sum ger at eg nú seti meg at skriva er, at eg síggi á Sandportalinum, at vit eru strikað av Føroyakortinum. Tá haldi eg, mann kann tala at.

Á Sandportalinum skrivar Gerhard Lognberg um Suðurøkið, sum sambart honum, ella Sandportalinum, er Sandoy og Suðuroy.

Skúvoyggin og Dímun eru eftir hesum ikki til meir, í hvussu so er ikki annað enn tveir blettir á kortinum.

Fyri umleið einum mánaði síðani ringdi skrivarin hjá sama manni til mín, og spurdi um eg vildi vera við, saman við hinum bygdarráðsformonnunum í sýsluni, at senda eina á heitan, til avvarðandi politikarar, um Sandoyartunnilin.

Eg játtaði, men viðmerkti kortini, at eg vónaði, hann eisini hugsaði hendanvegin, tí eg meini, at vit eru ein partur av hasum sambandinum, tí verður okkara ferðasamband ikki bøtt, er tað okkum líka mikið, um Sandoyingar fáa tunnil ella ei.

Tað er ymiskt við okkara atløgu- viðurskiftum, sum eg eftirhondini haldi er eitt sindur ullint, frá ymsum mynduleikum.

Tá verkætanin, sum nú hevur verið klár í nøkur ár, var klár at bjóða út, segði Landsverk, at hon kostaði 26 milliónir. Tað var í dýrastu tíðum, tá vit so fingu eina játtan á 7 milliónir, segði Landsverk, tað verða ov lítið til at byrja við.

Havnin kostaði 30 milliónir, segði Landsverk tá, og minst helvtin mátti játtast um arbeiðið kundi byrjast. Tað seinasta teir hava sagt fyri Anniku Olsen landstýriskvinnu er, at havnin kostar 35 milliónir.

Hvat ið er rætt havi eg ikki fakligan møguleika at meta um, men tá Landsverk sigur verkætlanina kosta kr. 26 milliónir í allar dýrastu tíðum, og nú ið allir prísir eru falnir, leggja 9-10 milliónir omaná, so er okkurt, sum ikki ruggar rætt.

Tað er eisini fitt av pengum nýttir til verkætlanina longu nú. Projekteringin er gjørd, eisini hevur ljóðað, at grótið, sum skal nýtast, liggur bæði sprongt og goldið uppi í Hundsarabotni, so tann írestandi játtanin kann ikki verða so ógvuslig.

Tað eru nokk umleið 5 milliónir goldnar higartil, so tað skuldu eftir tí verið á leið 21- 22 milliónir eftir, og ikki 35.

So sum hetta hevur gingið fyri seg, haldi eg tað vera rætt, at man ger, sum nú skal gerast við almennar vegir, latið privat feløg siga tykkum politikarum, hvat slíkar verkætlanir kosta, so fáa tit tann verðuliga prísin.

Nú eru onkrir politikarar, Anfinn Kallsberg og Gerhard Lognberg, farnir at tosa um, at tað er betur at sita sum teir sita, og so royna at ávirka eina komandi langtíðar ætlan.

Vónandi hugsa tit tá um okkum eisini. Minnist til, at okkara havn er ein verkætlan, sum er BYRJAÐ, hon skal bara gerast liðug.

Annars vil eg ynskja øllum, kendum og ókendum eini gleðilig jól.

# Eins og dýr, ið einki vit hava

2. br. Pæturs 2, 12.

RICHARD DANIELSEN



**Sjónvarpið og sex**

Er einki mark her í landinum longur. Eru hesir pornofilmarnir, sum sjónvarpið sendir inn í stovur okkara loyvdir. Hvat siga lógirnar um hesi viðurskifti? Um fólk høvdu drivið sex úti á vegnum, hevði politiið skjótt verið eftir teimum, tað ivist eg ikki í. Hvussu ber tað tá til, at sjónvarpið kann senda slíkt inn í stovur okkara, uttan at nakar grípur inn.

Hvat sigur mentamálaráðharrin og mentamálaráðið til hetta. Hvat sigur felagið hjá okkum, »Kristiligt lurtara og síggjara felag«. Hví sleppa hesi menniskju at hóreiggja sær so framman fyri okkum í egnu stovum okkara og gjøgnum OKKARA sjónvarp, til forargilsi fyri mong av okkum og til niðurbrótingar av moralinum í børnunum og teirra yngru millum okkara.

Hvat ið gongur fyri seg í tí privata, kunnu vit ikki gera so nógv við, men tað má vera eittt krav at public service, Kringvarpið heldur seg innan fyri sámulig mørk. Tað má síggjast, at almenna sjónvarp okkara er øðrvísi og ikki fylgir tilvildarligum lágum fjølmiðlum, sum gera sær dælt í heiminum í dag. Kringvarpið má vera ein stovnur, sum verjir rætta mentan og tað, sum vakurt er, ístaðin fyri at senda so niðurbrótandi sendingar, sum teir gera nú.

Tað má setast eitt krav frá mynduleikunum, til tey sum stýra Kringvarpinum at fínkemba sendingarnar fyri sex og tað, sum hoyrir tí heilaga hjúnabandinum til. Slíkt hoyrir ikki heima á opnum sjónvarpsskermi, heldur enn tað hoyrir heima á allfara vegi. Slíkt hoyrir dýrunum til, ikki menniskjum. Sjóvarpið eigur ikki at fáa loyvi til at halda fram við hesum sexsendingum, sum nú er komnar niður á ringasta slag av slíkum, har menniskju bera seg at sum dýr, til onnur at »hugna« sær við. Sjónvarpið eigur at rætta kós og fara frá hesum lága støði.

Høvdu vit havt eitt Kringvarp, sum klárt var øðrvísi enn tær mongu sjóvarps og teldu rásir, sum floyma inn yvir okkum í dag, so høvdu børn og ungu okkara kanska eisini av tí lært, hvat er ringt og vánaligt. Sum nú er, fáa tey tað fatan, at hetta er nakað, sum er í fínasta í ordan og fáa ein hugburð til sex, sum er fullkomuliga við síðuna av og verða oyðiløgd.

Tit, sum stýra Kringvarpinum. Kringvarpið er ikki tykkara, Kringvarpið er okkara. Vit allir føroyingar eiga tað. Tað eigur at ganga á odda við góðum sendingum, sum eru uppbyggiligar fyri samfelagið og varðveita góða mentan, í staðin fyri, sum nú ið at taka eftir tí ringasta, sum kemur uttanífrá.

Við kvøðu um gott nýggjár og ynskjum um eitt betri Kringvarp.

## Dansa í Dalið nýggjárskvøld

Nýggjárskvøld skipar dansifelagið Stígum Fast fyri føroyskum dansi í Dali. Byrjað verður klokkan 19.

- Hetta hevur verið fastur siður í fleiri ár, men í ár hava dalbinar gjørt meiria burturúr enn vanligt. Av tí at nýggjárskvøld hesuferð fellir á fríggjakvøld síggja dalbingar ein møguleika fyri at fáa fólk aðrastaðni frá leita sær til Dals, sigur Stígum Fast í tíðindaskrivi.

Bæði blíðskapur og dansistovan í Dali eru tiltikin, so dalbingar vóna at nógv avbygdafólk leita sær til Dals hetta kvøldið.

Fyri at tað skal verða so lætt sum gjørligt hevur Stígum Fast skipað fyri at bussar koyra ókeypis úr Skopun til Dals í samband við túrin av Gomlurætt klokkan 17. 15, og seinni úr Dali til Skopunar, í samband við síðsta túr hjá Teistanum av Skopun.

Dansurin verður í Eiriksgarði, og har verður umframt góðan føroyskan dans eisini smyrjubreyð og okkurt drekkandi at fáa, sigur **Dansifelagið Stígum Fast millum annað í tíðindaskrivinum.**